# Endiliga eydnaðist tað hjá Christian Høgna

**Vánirnar fyri plássið í Vejle álopinum tykjast hampuligar, men kappingin um tey bæði fremstu plássini er rættuliga stór**



*Endaliga eydnaðist tað Christiani Høgna Jacobsen at skjóta mál fyri Vejle. Hetta hendi leygardagin, tá Køge var á vitjan í Vejle*
*Mynd Savnsmynd*

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Annað vikuskiftið verður sjøtul settur á kappingina í næstbestu donsku deildini. Christian Høgni Jacobsen stríðist av lívsins kreftum fyri at vinna sær pláss á liðnum hjá Vejle, og tað tykjast vera møguleikar fyri, at tað fer at eydnast.

Vejle venjarin, Frank Petersen, tykist hava vónir um, at nytta skal fáast burtur úr føroyska spælaranum. Í hvussu so er hevur Christian Høgni fingið møguleikan í fleiri venjingardystum. Leygardagin var hann annar av álopsmonnunum, tá nýggja liðið í superliguni, Køge, var í Vejle.

Christian Høgni Jacobsen spældi fyrsta tíman, og tað er heilt víst, at hann fer at fáa nýggjar møguleikar at vísa, hvør dugur er í honum. Fimm minuttir undan hvíldini fór Vejle í snarálop. Christian Høgni varð spældur leysur, og hann var púra kaldur, tá hann gjørdist einsamallur við Køge málverjanum. Bólturin varð sendur flatt framvið málverjanum, og sjálvandi var tað ein sonn fragd fyri Christian Høgna, tá bólturin fór í málið, og Vejle var komið á odda 3–1.

Í vár var fleiri ferðir tætt við, at Christian Høgni skoraði fyri Vejle. Eitt nú restaði heilt lítið í, eftir at hann hevði framt gott einmans avrik í Parkini ímóti FCK. At vera álopsspælari og ikki at skora mál er sjálvandi sera tyngjandi. Soleiðis man Christian Høgni hava kent tað. Leygarkvøldið skoraði hann fyri fyrstu ferð fyri Vejle, og so er at vóna, at orðatakið, at har ein skriðan er lopin, er onnur væntandi, fer at passa í hesum førinum.

Chrisitan Høgni var millum teir fyrstu ellivu á Vejle liðnum. Teir vóru á odda 3–1, tá tað var hálvleikt. Hóast Køge kom á odda í 20. minutti, so var heimaliðið spælstýrandi allan 1. hálvleik, tá teir skoraðu í 22., 23. og 40. minutti.

Beinanvegin eftir steðgin komu tríggir nýggir Vejle spælarar á vøllin, og seinni vórðu tríggir afturat skiftir út. Teirra millum var Christian Høgni Jacobsen.

## Nýggjur kappingarneyti

Hóast venjarin higartil hevur givið Christian Høgna Jacobsen møguleikan, so skal tað arbeiðast nógv fyri at sleppa framat, tí kappingarneytarnir eru nógvir.

Í hesi vikuni fer Vejle ivaleyst at skriva sáttmála við ein nýggjan álopsspælara. Hann eitur Michael Blom. Hann hevur spælt í Vorup. Tær seinastu vikurnar hevur hann royndarvant í Vejle, og hann hevur gjørt góða reklamu fyri sær sjálvum. Í dystinum leygarkvøldið javnaði hann til 1–1, og hann átti næstsíðsta fótin á, tá Vejle skoraði til 2–1. Venjarin rósar nýggja manninum heilt nógv.

Tá Christian Høgni í 61. minutti fór av vøllinum, kom ein, sum eitur Kristian Nielsen inn, og tá Michael Blom fór av vøllinum átta minuttir seinni, kom Kenneth Knudsen inn. Tá var tað ikki so nógv álopsspælið, sum tað snúði seg um, men heldur at verja leiðsluna, sum Vejle hevði fingið ímóti superligu liðnum. Køge minkaði í 72. minutti um munin til 3–2, men teir megnaðu ikki at javna.

Longu seinnapartin í gjár var næsti venjingardysturin hjá Vejle á skránni. Tá spældu teir á sama vølli sum ímóti Køge ímóti superliguliðnum hjá AaB.

# Molde misti á heimavølli



*Enn røkist onki fyri, at Jákup Mikkelsen verður at síggja í málinum hjá Molde*
*Mynd Savnsmynd*

**Í Lillestrøm var rættuligt rok, tí áskoðararnir hjá illa stadda heimaliðnum hildu, at dómarin hevði snýtt teir fyri tvey brotsspørk**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tá Jákup Mikkelsen í venjingardystinum ímóti Viborg mitt í síðstu viku helt tætt tey trý korterini, sum hann var á vøllinum, birtist kanska ein lítil vón um, at hann skuldi fáa møguleikan, tá tað í vikuskiftinum varð farið undir seinna partin av kappingarárinum.

Nú er júst eitt ár síðani, at Jákup kom til Molde. Fyri einum ári síðani spældi hann fyrsta dystin á heimavølli ímóti Rosenborg, tá Molde býurin hevði jass festival.

Í síðstu viku var aftur árligi jassfestivalurin í Molde. Í tí sambandinum varð landskappingardysturin ímóti Odd Greenland úr Skien spældur. 8.137 áskoðarar møttu upp, og teir kundu staðfesta, at venjarin framvegis hevur mest álit á Eddie Gustafsson at røkja uppgávuna millum stólparnar, og at Jákup Mikkelsen harvið var á beinkinum allar 90 minuttirnar.

Úrslitið var 0–0. Heimaliðið hevði bóltin mest, men teir megnaðu ikki at spæla seg til upplagdar møguleikar. Gestirnir vóru ikki í festival hýri. Teirra setningur var at verja um tað, sum teir høvdu við sær, og tað eydnaðist. Áskoðararnir góvu til kennar, at teir vóru ikki nøgdir við leiklutin hjá Odd í undirhaldinum, men tað legði venjarin hjá Skien liðnum vertin í. Hann og spælararnir vóru komnir fyri at røkka javnleiki, og teir vóru væl nøgdir við, at tað eydnaðist.

Javnleikurin kom illa við, tí Molde vil so fegið vera topplið. Nú fór oddaliðið Lyn sjey stig frá teimum, og tað var møguleiki fyri, at Molde í gjárkvøldið skuldi hóttast á næstfremsta plássinum. Tá hevði Rosenborg heimavøll ímóti Viking úr Stavanger. Um tað eydnaðist Rosenborg at vinna tann dystin, so vóru teir – hóast tað ikki hevur verið serliga sannførandi higartil í ár – saman við Molde á næstfremsta plássinum. Og so verða tað teir úr Tróndheimi, sum verða roknaðir sum besta boðið uppá liðið, ið skal megna at fáa Lyn aftur.

## Rok í Lillestrøm

Lyn var á útivølli á Åråsen í Lillestrøm. Úrslitið var 1–0 til Lyn, og tað vóru teir á heimaliðnum og serliga áskoðararnir ikki væl nøgdir við. Tá dómarin skuldi fara til hús, noyddist løgreglan at fylgja honum. Sera vreiðir áskoðarar vildu heilsa upp á dómaran, sum teir hildu hevði snýtt teir fyri ikki minni enn tvey brotsspørk.

Øðin mundi ikki minst komast av, at tepra tapið hevði við sær, at Lillestrøm nú er í álvarsligum vanda fyri at flyta niður. Undan kappingarbyrjan varð roknað við, at Lillestrøm skuldi saman við Molde kappast við Rosenborg um meistaraskapin.

Brann úr Bergen var heppið, tá teir vóru á útivølli ímóti Moss. Teir stútaðu sigursmálið í yvirtíðini.

Størsta undirhaldið mundi vera, tá Bryne hevði vitjan av Bodø/Glimt. Bæði liðini liggja tungt í sjónum, og tá gestirnir tíðliga í 2. hálvleiki høvdu lagt seg á odda 3–0, sá tað illa út hjá Bryne. Men so vendi tað rættuliga. Í handavend minkaði heimaliðið um munin til 3–2. Tað restaðu nakrir fáir minuttir, tá teir javnaðu til 3–3, og tá klokkan var farin fýra minuttir út um vanligu leiktíðina, eydnaðist tað Bryne at skora sigursmálið. Einki er at siga til, at hýrurin á áskoðarunum var framúr góður.

Vålerenga tapti 2–0 á tjóðarleikvøllinum Ullevaal ímóti Stabæk. Sogndal spældi ikki í vikuskiftinum.



# Innandura kappróður

**– Tað er so avgjørt áhugi millum rógvarar at hava eina innandura Føroyameistara kapping í Concept 2 rógving, so væntandi verður ein tekningarlisti til ta fyrstu kappingina av sínum slag í Føroyum nakrantíð, løgd út á síðuna hjá Klaksvíkar Róðrarfelag aftan á Ólavssøku, sigur Kristian Eli Zachariassen, formaður í róðrarfelagnum í Klaksvík**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*



*Um alt gongur eftir ætlan, so fara føroyskir rógvarar at rógva innandura í eini føroyameistarakapping í heyst. Klaksvíkar Róðrarfelag fyrireikar eina kapping í innandura kappróðri á Concept 2 rógvimaskinum*

**Klaksvík:** Alla vetrarhálvuna liggur kappróðurin stillur kring landið. Soleiðis hevur tað altíð verið, men nú sær tað út til, at tað ikki verður í ár.

Klaksvíkar Róðrarfelag hevur ætlanir um at royndakoyra ein føroyameistarakapping í Concept 2 rógvimaskinum einaferð í septembur í Klaksvík.

Umstøðurnar hjá Klaksvíkar Róðrarfelag eru góðar og tað standa átta Concept 2 rógvimaskinur í venjingarhølunum hjá teimum.

Tað einasta formaðurin fílist á, er at brúsuviðurskiftini eru ikki nóg góð, men tað finnast aðrir møguleikar, um tað ikki eydnast at fáa tey viðurskiftini í rættlag áðrenn kappingin verður.

## Kappingin

Kristian Eli Zachariassen greiðir frá, at enn er ikki avgjørt hvussu kappingin verður skipað. Altjóða kappingar hava tveir vektklassar, ein lætt og ein tungvekt, har markið er 74 kilo.

Men Kristian Eli vísir á aldursmunin í føroyskum kappróðri, og sigur, at tað kann fara at vera ómetaliga torført hjá einum 17 ára gomlum drongi, sum vigar 75 kilo at gera seg galdandi millum menn mitt ella seinast í tjúgunum.

– So spurningurin er, um vit áttu at havt tveir aldursbólkar eisini. Mannfólk undir og yvir 18 ár og tað sama fyri kvinnurnar. Vansin við hesum er so, at tað verða so nógvir bólkar, og um ætlanin er at fáa stuðlar til at lata vinnarunum eina peningagávu, so kann tað fara at gerast torført, um ov nógvir bólkar eru, heldur Kristian Eli.

Hann sigur, at hugsast kann, at kappingin verður skipað sum ein Cup kapping, har til dømis 8 ella 10 tey bestu fáa ein møguleika aftur at, við at tey koma í eina hálvfinalu og síðani verður sjálv finalan.

– Men so koma tey at rógva tríggjar ferðir ein dag, og vit vita ikki, um tað kanska verður ov nógv av tí góða.

Teinurin, sum róð verður, er 2.000 metrar upp á tíð. Rógvarin avger sjálvur tyngdina á takinum. Tað vil siga, at hann stillar sjálvur inn, hvussu tungt tað skal verða at rógva. Men tað er ikki loyvt at broyta innstillingina, tá hon so er gjørd.

Tað er soleiðis, at lættari maskinan verður stillað, fleiri tøk mugu takast. Ella sagt á ein annan hátt, so telur maskinan metrarnar skjótari niður, jú tyngri tað verður at rógva.

## Tekningarlisti á heimasíðuna

Kristian Eli sigur, at ætlanin er aftan á Ólavssøku, tá nøkur viðurskifti eru komin upp á pláss, at leggja tekningarlista út á heimasíðuna hjá felagnum, har luttakararnir so kunnu tekna seg. Og sjálvandi verður heimasíðan so eisini nýtt til at leggja úrslit út á.

Hann sigur eisini, at hetta kann fara at gerast ein góður møguleiki til at savna upplýsningar saman um føroyskar rógvarar. Tí tá teir skulu til eina tílíka kapping, skulu tey upplýsa vekt og aldur. Og við teimum upplýsningunum saman við úrslitunum hjá hvørjum einstøkum, so skuldi verið grundarlag fyri at lýst støðið í føroyskum kappróðri ella rættari sagt føroyskum innandura kappróðri.

Tí tað kann ikki samanberast at rógva á eini rógvimaskinu inni og so í tí føroyska kappróðrarbátinum, har veður, vindur og streymur eisini spæla ein stóran leiklut.

– So kunnu vit møguliga finna út av um nakað er í øllum reypinum, sum dagliga hoyrist millum rógvarar, sigur Kristian Eli skemtandi og flennir.

Hann heldur, at tað einasta, sum skal til fyri at skipa fyri eini tílíkari kapping her á klettunum er, at onkur tekur seg saman og ger nakað við tað. Tí tíðin leggur so avgjørt upp til tað, nú fleiri og fleiri feløg kring landið hava skaffað sær Concept 2 maskinur.

## Sjey feløg hava Concept 2

– Tað eru sjálvandi ikki øll feløgini, sum hava maskinurnar, men mær vitandi eru feløgini, sum hava maskinur, sjey í tali. Tey eru: Havnar Róðrarfelag, Róðrarfelagið Knørrur, Argja Róðrarfelag, Miðvágs Róðrarfelag, Vágs Kappróðrarfelag, Róðrarfelagið Strálan og Klaksvíkar Róðrarfelag, greiðir Kristian Eli frá og so leggur hann aftur at, at eitt nú Fragd og Fimi og Top Form eisini hava Concept 2 maskinur.

Eisini heldur hann, at um ein er í form, tað vil siga hevur góða kondi, so ræður tað eina mest um at læra seg at rógva á eini tílíkari maskinu. Og tá er tað møguliga nóg mikið at venja á maskinunum í einar tvær vikur ella so.

Talan er, sum áður nevnt, bert um eina roynd nú í septembur, men um tað roynist væl, so verður ein almenn ella óalmenn føroyameistarakapping tíðliga komandi ár.

– Við tað, at vit hava eina royndarkapping fyrst, so má man vóna, at vit kunnu síggja so nógvar byrjunartrupulleikar sum gjørligt og fáa rætta tað, sum vit gera skeivt til eina aðru ferð, sigur Kristian Eli Zachariassen.

Um kappingin verður almenn ella óalmenn veldst um Róðrarsambandið kemur upp í ella ikki.

Kristian Eli sigur, at hann hevur tosað við onkrar rógvarar, umframt at felagið hevur lagt ein spurning út á heimasíðuna fyri at kanna áhugan fyri eini tílíkari kapping. Og tað letur til at áhugin er til staðar.

Men hann leggur at endadent á, at nógv viðurskifti eru ógreið enn viðvíkjandi kappingini, sum tó er ætlanin at fáa í rættlag eftir Ólavssøku, soleiðis at klárt verður at hava kappingina í septembur.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!